## HM-dystir á skránni

Mikukvøldið eru nógvir dystir í HM-undankappingini á skránni.

Í okkara bólki er ein dystur. Hesin verður í Nicosia á Cypros, har heimaliðið tekur ímóti Ísrael.

Fyrri dysturin teirra millum varð leiktur í september mánaði, og tá vann Ísrael 2-1 í Tel Aviv.

Danir spæla eisini landsdyst mikukvøldið. Hesin er á útivølli móti Georgia. TV3 sendir beinleiðis frá dystinum kl. 17.

**-jm**

## Todi aftur á grasi

Skaðin hjá Toda Jónsson er nú somikið batnaður, at føroyski álopsleikarin hjá FCK aftur er farin at venja saman við liðfeløgunum.

Fríggjadagin var hann saman við liðfeløgunum og vandi, og tó at tað enn gongur nakað av tíð, áðrenn hann er í fullari venjing, so fegnast Todi um, at hann nú aftur kann venja saman við hinum leikarunum í høvuðsstaðarfelagnum.

**-jm**

## Fyrsti sigurin til Holte

Sol eydnaðist tað. Um vikuskiftið fekk Holte IF síni fyrstu stig í donsku flogbóltskappingini. Hesi komu til høldar, tá Bárður, Ragnar og hinir á liðnum vunnu 3-1 á Spentrup. Spentrup hevur enn fyrstu stigini á árinum til góðar.

Komandi vikuskiftið skal Holte spæla á útivølli móti Hvidovre VK, og eisini har hava føroysku útisetarnir góðar vónir um stig.

**-jm**



*FSF hevur gjørt av, at felagsskapurin fer at lata 12 mió kr. til eina fótbóltshøll. Tað er tó framvegis sannlíkt, at nógvar milliónir afturat skulu afturat, áðrenn ein høll er veruleiki*

# Nógvar milliónir skulu leggjast á borðið

**FSF er ikki sinnað at veita annan stuðul til fótbóltshøll enn tær tólv milliónirnar í UEFA pengum, men tað verður roknað við, at tað skal bera til at byggja fyri minni enn tær hálvt hundrað milliónirnar, sum stóra ætlanin verður mett at skula kosta**

FÓTBÓLTSHØLL
*Jóannes Hansen*

Tað er eitt brennandi ynski hjá føroyskum fótbólti, at ein høll verður bygd, sum fer at bera møguleikar við sær fyri at venja og spæla fótbóltsdystir allar tólv mánaðirnar. Tað verður mett, at ein sovorðin høll er ein av høvuðsfyritreytunum fyri, at føroyskur fótbóltur skal mennast og lyfta seg í altjóða høpi.

Leygardagin góvu fótbóltsfeløgini til kennar, at tey eru fyri, at kappingarárið verður longt nakrar vikur, og at landskappingin verður 50 prosent størri, enn hon hevur verið síðani 1988. Hetta eru stig á røttu leiðini, um málið er, at føroyskur fótbóltur skal lyfta seg í altjóða høpi. Men fótbóltshøllin og harvið betraðar vánir fyri fótbólti alt árið er neyðug, um føroyskur fótbóltur skal styrkjast nógv.

Breið semja er um hetta. Spurningurin er so, hvør skal byggja fótbóltshøllina, hvar hon skal byggjast, hvør skal eiga hana, hvør skal reka hana og ikki minst, hvør skal rinda íløguna, og hvør skal hava ábyrgdina av rakstrinum.

Nú er nakað síðani, at FSF gav til kennar, at UEFA hevur sett pengar av til at byggja eina sovorna høll í



Føroyum fyri. Onkur feløg og einstaklingar og kanska eisini kommunur hava vent og snarað møguleikanum, um tað kann bera til, og hvussu tað skal bera til at bjóða seg fram. Men enn er einki ítøkiligt komið í ljósmála uttan tað, at Sosialurin fyri nøkrum mánaðum síðani vísti strikumyndir av venjingarhøll, sum tað segðist, at tað var áhugi fyri at byggja í Skálafirði. Eisini hava røddir verið frammi um høll í Sundalagnum, og so hava møguleikarnir verið nevndir at leggja tak á Tórsvøll og Svangaskarð.

Á fundinum leygardagin varð spurningurir havdur á lofti. Tær tólv milliónirnar eru framvegis tøkar, og FSF hevur sett ein freist til áhugað at bjóða seg fram. Freisin er 15. apríl næsta ár. Tá roknar FSF við, at áhugað hava sent Fótbóltssambandinum verkætlan, sum fevnir um grundøki, bygning, eigaraviðurskifti, fígging av íløgu og rakstrarætlan.

### Leikluturin hjá FSF

Í Fótbóltssambandinum arbeiðir eina bólkur ella nevnd við hesum málinum. Rúni Heinesen er formaur, og umframt hann eru í bólkinum Bjarki Mohr, Jens Erik Magnussen, Karl Vidtfeldt og Ísak Mikladal.

– Tað er ikki ætlanin, at FSF skal eiga høllina, og tað er ikki ætlanin, at FSF skal vera bundið at høllini á annan hátt, enn at FSF fer at leiga tímar til landsliðini. Fótbóltssambandið hevur ikki fíggjarligan førleika at binda seg til so stóra íløgu, staðfestir Rúni Heinesen, og hann heldur fram:

– FSF vil fegið hjálpa til so mikið, sum tað ber til. Um vit rokna út frá virðinum á sveisiska gjaldoyranum í dag, so er stuðulin frá UEFA 12,2 milliónir krónur. Okkara metingar siga, at um høllin skal vera av tí slagnum, sum tann størsta í Íslandi er, so fer hon at kosta hálvt hundrað milliónir krónur.

*- Tað er ikki ætlanin, at FSF skal eiga høllina, og tað er ikki ætlanin, at FSF skal vera bundið at høllini á annan hátt, enn at FSF fer at leiga tímar til landsliðini, sigur Rúni Heinesen*

*Hvar skulu tit hjálpa til, tá ið tit ikki leggja íløgupengar á borðið?*

– Vit fara í næstu viku at senda kunningarfaldara til áhugað, har greitt verður frá, hvørji eitt nú teknisku, fíggjarliga og eigaraligu krøvini eru. Síðani eru vit klárir at vegleiða og hjálpa møguligum áhugaðum so nógv, sum tað ber okkum til. Møgulig uppskot um ætlan fara vit so at meta um, og so verður tað upp til FSF at gera av, hvat uppskot verður tað mest áhugaverda. Mest áhugaverda uppskotið verður tað, sum fer at tæna føroyskum fótbólti sum heild best.

### Møguligir íleggjarar

Í grannalondunum eru fleiri fótbóltshallir komnar seinastu árini. Í Íslandi eru fýra hallir. Tann í Reykjavík er væl størri og harvið dýrari enn hinar. Í Reykjavík er hæddin á miðjuni 22 metrar og úti við er hæddin fimm metrar. Í Kópavági, Akranesi og Akureyri hava hallirnir onnur mát. UEFA hevur ikki sett nøkur krøv til minstu mát, men tað er greitt, at størri og hægri ein høll er, betri verða møguleikarnir at spæla altjóða dystir í henni.

Rúni Heinesen vísir á, at tá ið tað verður tosað um hallarprís upp á hálvt hundrað milliónir, so verður roknað við høll at tí slagnum, sum tann í Reykjavík er av.

– Tað ber eisini til at byggja væl bíligari hallir, sum kunnu tæna endamálinum, ið er, at tað skal bera til at spæla fótbólt alt árið. Tað er sjálvandi neyðugt við ljósi og ávísari bjálving, men tað er ikki neyðugt at gera høllina av sovornum slagi, at talan so at siga verður um eyka stóra ítróttarhøll. Royndirnar siga, at tað ber til at fáa kostnaðin niður á einar 20-30 milliónir, og tá verður beinanvegin talan um heilt annað fíggjarligt tak, enn tað verður, um talan verður um høll fyri hálvt hundrað milliónir.

*Hvør ímyndar tú tær skal fara undir sovorðið tak, tá ið FSF við UEFA sum stuðli ikki hættar sær undir tað?*

– Mest upplagt hevði tað verið, at landið og kommunurnar spældu við. Men tað er eisini ein møguleiki, at talan verður um íløgufelag, sum setur pengar í sovorna høll fyri at forrenta eginpeningin fyri partaeigararnar. Umframt til fótbólt og annan ítrótt kundi tað hugsast, at ein sovorðin høll varð brúkt til messur og stevnur av sovornum slagi, sum tað higartil hevur verið viðbrekið at skipa fyri í Føroyum, tí møguleikarnir at hava alt undir taki ikki hava verið nóg góðir. Men nú fáa vit at síggja. Talan er um eitt tilboð um fíggjarligan stuðul frá UEFA, sum er galdandi fram til 2008. Tá fellur hetta burtur, men tað merkir ikki, at UEFA ikki eisini eftir ta tíð fer at vera við í slíkum ætlanum. Talan er um stóra og spennandi og kollveltandi ætlan fyri føroyskan fótbólt. Nú fáa vit at síggja, hvørjir møguleikarnir fara at verða, sigur Rúni Heinesen.




## Skattalistin

Skattalistin fyri Skála Kommunu fyri árið 2003 liggur frammi til alment eftirlit á Kommunuskrivstovuni frá 15. nov. til 29. nov. 2004.

**Skála Kommuna**

## Skattalistin

Skattalistin fyri Tvøroyrar kommunu fyri árið 2003 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 15. november til 26. november 2004.

**Tvøroyrar býráð**

## Skattalistin

Skattalistin fyri Vestmanna kommunu fyri 2003 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð frá 17. november til 1. desember 2004.

**Vestmanna Kommuna**

## Skattalisti

Skattalisti fyri Sjóvar kommunu fyri árið 2003 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 17. nov. til 1 des. 2004, báðir dagar íroknaðir.

Skrivstovan er opin gerandisdagar kl. 8.30 - 12.00.

**Sjóvar kommuna**
**490 Strendur**

## Skattalistin fyri 2003

Skattalistin fyri Fuglafjarðar kommunu liggur frammi til alment eftirlit á Kommunuskrivstovuni hvønn gerandisdag frá kl. 10.00-15.00

**frá 18. nov. - 3. des. 2004**

Fuglafjørður, tann 15. november 2003

**Fuglafjarðar kommuna**

**Fólkaflokkurin hevur**

## LANDSFUND

**27. november 2004 kl. 10.00**
**á Hotel Hafnia.**

Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, verður gestarøðari.

Rúna Sivertsen viðgerð evni »Felags avgerðir – felags ábyrgd«.

Landsfundurin endar við døgurða.

Øll fólkafloks áhugað eru hjartaliga vælkomin.

## Innbjóðing til almennan fund

Í sambandi við at nú verður farið undir at byggja kirkju í Hoyvík, verður boðið til

**Almennan borgarafund**
**í Skúlanum í Hoyvík**
**leygardagin 20. 11. kl.14.00**

Arkitektarnir frá Albert Isfeld og Gudmund S. Hansen vera við og vilja siga frá um tekningar, modell og um projekteringina.

Høvi verður at gera viðmerkingar.

Ætlandi verður arbeiðið klárt at bjóða út fyrst í komandi ári.

*Hoyvík 10. november 2004*

**Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju**
**Kirkjuráðið fyri Havnar kirkju**
**Katrin Dahl**
**Formaður í bygginevndini**

## Handverksáhugað í Norðoyggjum

Farið verður nú undir at kanna og skráseta handverk í Føroyum. Byrjað verður í Norðoyggjum.

Fundur verður í Ósá skúlanum í Klaksvík hóskvøldið 18. november kl.19.30.

**Skrá:** Stutt frágreiðing um kanningina, vegleiðing viðvíkjandi spurnarbløðum, drekkamunnur og prát.

Stuðlið føroyskum handverki og møtið fjølment!

**v/ Føroya Heimavirkisfelag**
**Randi Vang og Jónhild Johannessen**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

**Vegna ov fáar umsóknir til fyrr lýstu lýsing verður lýst av nýggjum:**

## Starvsfólk til goymsluna

Til goymsluna á Landssjúkrahúsinum er eitt fulltíðar avloysarastarv leyst at søkja til setan skjótast gjørligt til og við 31. oktober 2005. Arbeiðstíðin er vanligar gerandisdagar frá kl. 7.00 til kl. 15.00.

Goymslan umsitur innkeyp/móttøku/sølu/uppfylling á deildunum á Landssjúkrahúsinum, sølu til Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahús, røktarheimini, bústovnar, heimarøktin og onnur viðskiftafólk innan heilsu.

Goymslan umsitur eisini útlán av hjálpartólum, sum verða lænt sjúklingum heim styttri tíðarskeið.

Umframt tað vanliga arbeiði á goymsluni kemur viðkomandi at umsita hesi útlán.

Tað starvast í løtuni 6 starvsfólk á goymsluni.

**Førleikakrøv:**
- faklig vitan innan tól og vørur, sum dagliga verða nýtt í røktini á sjúkrahúsum
- edv-kunnleiki á brúkarastøði (Navision Financials forrrit verður brúkt)
- kunnleiki til goymslur og vørustýring er ein fyrimunur.

**Eginleikar:**
- góður røkjuskapur
- góð samstarvsevni og tænastasinni
- at verða opin og positiv/ur, eisini tá nógv er at gera.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Malenu Meitelberg, leiðara á goymsluni.
Telefon 30 45 99 lokal 1163
ella e-post malenam@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 1. desember 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

W W W . S O S I A L U R I N . F O